Álit II

í

løgtingsmáli nr. 10/2023: Uppskot til løgtingslóg um at byggja H-bygningin á Landssjúkrahúsinum lidnan

Landsstýriskvinnan í heilsumálum, Margit Stórá, hevur lagt málið fram 7. september 2023, og eftir 1. viðgerð 19. september 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 17. og 19. oktober 2023 og lagt fram álit 3. november 2023.

Við 3. viðgerð 16. november 2023 varð málið beint aftur í nevnd. Nevndin hevur síðan viðgjørt málið á fundi 21. november 2023. Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýriskvinnuna í heilsumálum, Margit Stóra, saman við Sjúkrahúsverkinum og Landsverki.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Miðlaumrøða í samband við hetta málið reisti fleiri spurningar í politisku skipanini. Fyri at fáa vissu fyri, at ikki verður neyðugt við meirjáttan, tá ið henda verklagslóg er samtykt, valdi nevndin at innkalla partarnar enn einaferð.

Fundarfrágreiðingin, ið var orsøkin til ivamálini, var ikki ein endaliga góðkend frágreiðing. Frágreiðingin snúði seg um ein part av liðugtgeringini av H-bygninginum, ið hevur egna verklagslóg, nevniliga víðkaði parturin av parkeringskjallaranum.

Undir hoyringini hevur nevndin enn einaferð fingið váttað frá øllum avvarðandi pørtum, at upphæddin í hesum uppskotinum fer at halda, og at neyðugt verður ikki við meirjáttan, og at avvarðandi partar eru nøgdir við H-bygningin, sum ætlanin nú fyriliggur.

Við hesum viðmerkingum tekur nevndin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 22. november 2023

Eyðgunn Samuelsen formaður	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	